**Uppskot**

**til**

**kunngerð um árliga skúladagatalið í fólkaskúlanum**

Við heimild í § 18, stk. 1 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009 verður ásett:

**§ 1**. Árliga skúladagatalið í fólkaskúlanum er 198 dagar.
*Stk. 2.* Skúlaárini 2011/12 og 2012/13 verður skúladagatalið í fólkaskúlanum tó lækkað við tilamans 5 skúladøgum.
*Stk.3.* Skúladagatalið skúlaárini 2011/12 og 2012/13 lækkar við ávikavist 2 og 3 døgum í mun til, um lærararnir í einstaka skúlanum fara á skeið í fakligari lesing ella kunningartøkni.
*Stk. 4*. Skúlaárini 2011/12 og 2012/13 nýta skúlarnir 2 dagar til fakliga lesing og 3 dagar til kunningartøkni.

**§ 2**. Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2011. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 140 frá 13. september 1995 um árliga talið av skúladøgum í fólkaskúlanum.

Mentamálaráðið, 15. apríl 2011

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
*landsstýriskvinna*

/Leivur Harryson (sign.)